# Minningarorð um Elspu Mariu Kristinu Zachariasen, lærara



Hin 8. mars í ár var fjørðurin rógvin hjá Elspu Mariu, lærara við Skúlan á Ziskatrøð. Vit, ið starvaðust saman við henni vóru vitandi um, at heilsan hevði bilað munandi seinastu tíðina, og tað er einki yvir at dylja, at hvør í sínum lagi stúrdu vit fyri tí, sum framtíðin helst fór at bera við sær fyri Elspu og hennara kæru, men kortini mundi fáur okkara gruna, at tíðin, ið eftir var, fór at verða so stutt.

Elspa var fødd hin 5. juni 1941 í Hattarvík, har hon eisini vaks upp, og mundi fáa sera gott í beinini bæði til tað dagliga og hitt andaliga mennandi, men hugurin stóð til bókina og lærdóms, so tað var natúrligt hjá henni at leita skúla- og útbúgvingarleiðina.

Læraraprógvið varð so tikið á Føroya Læraraskúla í juni 1964 saman við 24 øðrum fólkum, ið sum vera man komu ymsa staðni úr landinum, og flestu av feløgunum gjørdust hesi árini vinfólk hennara.

Eftir lokna útbúgving gekk leiðin til Klaksvíkar, har ein stórur skúli var um tað mundið. Við Klaksvíkar Skúla starvaðist Elspa til 1975, tá hon eitt skifti fór til egnu oyggj sína at vera lærari í 3 ár til 1978, men kom aftur til Klaksvíkar hetta sama árið, og hevur hon starvast sum lærari her síðani við Ziskatraðar Skúla frá 1979, tá skúlaverkið varð býtt í tvær eindir.

Hesi mongu árini hevur Epsla verið skúlaverkinum ein hollur, álítandi og ábyrgdarfullur lærari, ið sýndi stóran og inniligan tokka til børn og arbeiði. Hon var altíð til reiðar at taka tøk skúlanum at frama, ja, eitt av hesum fólkunum, ið ikki var neyðugt at taka upp eftir. Verk hennara var gjørt til lítar og við stórari ábyrgd, og einki er at ivast um, at soleiðis var Elspa eisini í øllum øðrum lívsins viðurskiftum, ikki minst mótvegis sínum egnu kæru, manni, børnum og ommubørnum.

Somuleiðis er vert at nevna hennara áhaldandi luttøka og stuðul innan heimamissiónina, KFUM og K her í Klaksvík, har hjúnanna áhugi fall saman í eina virkandi eind, ið man hava havt stóra signing við sær.

Sostatt er tað ikki bert skúlin og børnini, ið hava mist nógv við Elspu, men eisini tað verk, ið hon saman við Akseli røkti so fyrimyndarliga innan heimamissiónina.

Hugur okkara fer til tykkara í familjuni, Aksel, Steinbjørn og Marjun við familju, ið uttan iva kenna saknin nívandi, men vit ynskja og biðja eftir, at Harrin má veita tykkum styrki til at fara víðari á leiðini, har góð, virðismikil og kær minni eisini geva megi til gerandis – og heilagt.

Friður veri við minninum um Elspu Zachariasen.

**Vegna starvsfólkið við Skúlan á Ziskatrøð**
**Asbjørn Lómaklett, skúlastjóri**

Nýggj fløga:

# Anno anno 2002

**Nýggj fløga kemur út í dag. Tað eru Knút H. Nielsen og Jonhild A. Nielsen, ið eru høvuðsnøvnini í bólkinum Anno. Talan er um sermerktan føroyskan pop. Og Knúti líkt, so tykist tónleikurin ankraður í føroyskan botn og føroysk kvæði**

TÓNLEIKAUMRØÐA
*Dagfinn Olsen*



*Nýggj fløga kemur út í dag. Tað eru Knút H. Nielsen og Jonhild A. Nielsen, ið eru høvuðsnøvnini í bólkinum Anno*

Í dag kemur nýggj fløga á marknaðin. Seinnu árini eru flest allar útgávur komnar úr norðara endanum av landinum ella úr miðstaðarøkinum. Men nú hoyrist ljóð sunnaneftir.

Knút Hentze Nielsen gav í 1999 fløgu út undir heitinum Anno. Hendan var instrumental, men t.d. heitislagið Álvadansur, náddi væl fram.

Og tað er Knút, ið er høvuðsnavn. Jonhild eigur røddir og eisini orð. Knút eigur tónleikin og orð og hevur annars staðið fyri meginpartinum av framleiðsluni.

Knút og Jonhild vóru eisini partur av tiltikna suðuroyarbólkinum Júmen, sum eisini fekk tað eyðkenni fest á seg, at sermerkti tónleikurin leiddi aftur í forna sang- og kvæðamentan.

At siga, at tey sostatt vóru fyrst við nú so væl dámdu kvæðarockbylgjuni, er kanska ikki rætt. Men tey hava so lagt lunnar, saman við øðrum, ið gingu undan.

Innan føroyskan tónleik eru tey ikki ársungar. Síðani áttatiárini hava tey verið virkin. Fyrst í bólkinum Section og síðani í so mongum øðrum bólkum. Nevnast kunnu t.d. Mol-Dur, Júmen, Hvarv og Blanding.

## Mín Verð

Nýggja fløgan ber heitið Mín verð. Mótvegis fløguni frá 1999, Álvadansur, so her nú talan um bæði orð og tónleik. Og tað er sjálvsagt ein styrki, skal ein hugsa um lurtarafjøldina.

Sum heild er talan um vællljómandi tónleik, ið flýtur millum pop og rock. Hóast føroysku røturnar í tónleikinum, so eru spírarnir lættir og nútímans.

Løgini eru løtt og falla væl í oyruni, hóast stílurin ikki er at fara skeivur av. Komponisturin hevur egnan stíl, ið ikki altíð heldur somu leið, sum lurtarin væntar. Men tað er helst meira ein dygd, enn nakað annað, tí hóast sereyðkennini, so dettur neyvan nakar lurtari av á vegnum orsakað av hesum.

Samstundis, sum føroyski botnurin heldur fast, so ger valið av ljóðførum, at umframt pop og rock, so hevur hugurin hug at horva til klassiskt í rockbúna.

Nóg Nógv er helst eitt lag, ið kann gera seg galdandi, saman við Tú Mín verð. Ilt er annars at taka dagar ímillum, tí løgini eru dygdargóð, hóast ymisk. Her verður tað óivað upp til hin einstaka at gera av.

## Dygd í tekstunum

Samstundis, sum løgini falla væl, so er tað eisini, sum hava tey hug at halda lurtaran vaknan. Einki er sjálvsagt.

Trý instrumental løg eru. Men annars eru orð komin afturat, mótvegis fyrru fløguni hjá Anno.

Og tað er kanska serliga her, tey sum hava hug at granska og hugsa, fáa nakað at tríva í.

Tikið verður ofta til, at møðsamt er við endaleysu variatiónunum av "eg elski teg - tú elskar meg".

Soleiðis sæð kann staðfestast, at fleiri og fleiri gera upp við hesa leið. Og so er eisini við tekstunum á nýggju fløguni hjá Anno.

Her er dygd í, væl er yrkt og grundan og umhugsni leggur góðan botn í. Fyri tað mesta er talan um djúphugsni og spurningar. Men eisini yndisligar yrkingar um kærleika og sambond. T.d. vakra vøguvísan Sig Góða nátt.

## Sermerkt

Á fyrru fløguni hevði Knút mynd av soninum Finni, ið tá var lítil. Síðani tá er økt um mannaættina. Hesaferð er næsti sonur, Jóhan, á fløguni. Hetta er stuttligur eginleiki og tað, ið onnur nevna kuriosum - ein góð ella skemtilig søga, ið ein kann greiða frá.

Tónasmiðurin er sera virkin. Annað stuttligt at viðmerkja, og av áhuga hjá summum, er, at eitt nummar er sett við hvørt lag/verk. Hetta sigur frá, hvat nummar kompositiónin er í røðini av avrikum tónasmiðsins.

Ein fløga, ið er til gaman og álvara, har ein kemur úr dansi og stevi til flótandi tónafloym, ið tekur hugin út á hav, har tankar fáa flog. Hetta er Anno anno 2002.

Tey, ið taka lut á fløguni eru Jonhild Andreasen Nielsen, ið syngur, Knút Hentze Nielsen, ið leikar ljómborð og tekur sær av tøkni, Hjalmar Magnusen syngur og spælur guitar, Trúgvi Strøm leikar guitar og Árni Joensen hevur fingist við tøkni, leikt guitar og forritað.

Upptøkur eru farnar fram í Mol-Dur Studio, Knút og Árni hava ljóðblandað. Árni mastraði. Martin Hentze rættlas og Niels Arge Galán og Uni Árting gjørdu húsan.

Tutl gevur út og fløgan fæst kring landið í dag.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá ið elskaði sonur og beiggi okkara

**Dia Petersen**
Sørvágur

doyði og varð jarðaður.

Vit takka løgregluni og øllum øðrum, ið gjørdu eitt stórt arbeiði fyri at leita eftir honum.

Somuleiðis takka vit fyri jaðarferðartalurnar, sang og tykkum mongu, sum vístu okkum stórt hjálpsemi í samband við sjálva jarðarferðina og tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

Tøkk til Zarepta fyri ervið og tykkum, sum mintust Dia við gávum til Sinnisbata.

Harrin signi tykkum øll.

*Kærastu heilsanir í navni Jesusar*

**Dagny, Harry við húski**





*Mynd: Petur Pólson og hini í Clickhaze finnast fríggjadagin á hillunum við einari nýggjari EP.*

# Clickhaze við nýggjari EP

**Prix Føroyar vinnararnir koma fríggjadagin á gøtuna við teirra fyrstu sjálvstøðugu fløgu**

ÚTGÁVA
*Heri á Rógvi*

Ein av fremstu bólkunum í Føroyum, Clickhaze, kemur fríggjadagin við einari fløgu. Síðani sigurin í Norðurlandahúsinum hevur bólkurin havt vind í seglini, og higartil hevur talan verið um eina longri røð av framførslu uttanlands. Talan hevur verið um festivalar í Danmørk og fyri stuttum vitjaði bólkurin í senska høvuðsstaðnum, Stokhólmi, har bólkurin eisini varð nógv fagnaður. Seinni í summar skal bólkurin spæla á Roskilde Festivalinum, sum er størsti festivalurin av sínum slag í Evropa.

Bólkurin er nú klárur við einari fløgu, sum verður at finna á hillunum fríggjadagin. Fløgan rúmar seks løg, og talan er um eina sokallaða EP. Trý av løgunum eru frá Prix Føroyar finaluni. Hini trý eru upptikin í Lundgaard Studio, sum var partur av vinninginum hjá bólkinum fyri sigurin á Prix Føroyum. Fýra sangir eru við enskum teksti. Ein sangur verður sungin á gøtudonskum og ein verður sungin á føroyskum.

Óli Poulsen hevur saman við Finni Hansen ljóðblandað og produserað fløguna.

Lesið meira um fløguna og bólkin seinni í vikuni.

# Tíðindaskriv







*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í sambandi við Jóansøkuna 2002 hevur Restorffs Bryggjarí gjørt tvær bjóretikettir. Myndin, sum Føroya Fornminnissavn hevur funnið fyri Restorff, er av Vági og er tikin um seinasta aldarskifti. Hetta er hugnalig og nostalgisk mynd av einari farnari tíð, m.a. sæst kirkjan enn standa á Kirkjukletti, hon varð í 1942 flutt til Hovs.

Jóansøkubjórið er at fáa frá 19. juni. Ætlanin hjá Restorff er á hvørjum árið at gera ein jóansøkuetikett sum allarhelst verða samlaraobjektir.

Restorffs Bryggjarí hevur nýliga latið upp deild í Miðvági og er ætlanin at gera eina vestanstevnuetikett nú stevnan verður í Miðvági. Restorff fættir fegin frá vágafólki um nakar hevur eina góða, gamla og livandi mynd av Miðvági sum nýtast kann til etikett, kanska er so heppið at onkur fotomynd hjá Mikkjali av Ryggi er gloymd í onkrum albummi? Slík myndi kundi havt stóran almennan áhuga.

At enda verður sagt frá, at 18. juli kemur ólavsøkubjórið hjá Restorff á marknaðin.

